# Løgmaður rennur ikki undan

**Hann er harmur um, at tað er farið at ljóða, sum um hann ikki vil hava fund við ein bólk av kvinnum um at fáa meiri javnstøðu á tingi**

JAVNSTØÐA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vilja kvinnurnar fáa fund við meg, skal tað ikki standa á.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, leggur dent á, at hann hevur onki ímóti at tosa um møguleikarnar fyri at fáa fleiri kvinnur upp í politikk.

Seinastu tíðina hevur ein bólkur av kvinnum roynt at fáa fund í lag við løgmann um at broyta vallógina, so at tað verður lættari at fáa kvinnur á ting.

Men tvær ferðir hevur løgmaður avlýst fundin og tað hevur fingið umboð fyri kvinnubólkin at rógva framundir, at løgmaður er ikki serliga sinnaður at tosa við tær um málið.

- Tað harmar meg at tað er farið at ljóða sum um, at eg renni undan fundinum, sigur løgmaður.

- Eg havi aldrin í lívinum borið meg undan at hitta fólk á fundi, men í hesum føri havi eg rætt og slætt verið so upphongdur, at tað hevur ikki borið til, leggur hann afturat.

Hann vísir á, at hetta var um tað mundi, at tað leikaði allar harðast á í samgonguni at finna semju um fíggjarlógina og hann heldur, at tað vildi verið ábyrgdarleyst at farið frá teimum tingingunum, tí tað kundi sett samgonguna í vanda, sum løgmaður hevur evstu ábyrgdina av.

- Men kvinnubólkurin skal nokk fáa sín fund við løgmann. Seta tær seg ikki í samband við meg, skal løgmansskrivstovan nokk seta seg í samband við tær við eini nýggjari fundartíð, sigur løgmaður.



*Løgmaður er sinnaður at lurta eftir kvinnunum, men hann er ivingarsamur um uppleggið um javnstøðu*

## Løgmaður ivasamur

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann er sjálvandi sinnaður at lurta eftir tí, sum kvinnubólkurin hevur at føra fram og so at arbeiða víðari hagani frá.

Sjálvur hevur løgmaður eisini onkrar spurningar til kvinnubólkin um málið.

Men í útgangsstøðinum er hann ivasamur um tað, at broyta vallógina, er rætti máti at fáa fleiri kvinnur á ting upp á.

Hann heldur, at tað er ikki bara ein fyrimunur at broyta vallógina, soleiðis sum kvinnurnar vilja tað, tí atkvøðurnar kunnu eisini fella so, at tað fer at forða kvinnum at koma á ting.

Tað kann henda, vissi ein mannfólkalisti fær so nógvar atkvøður, at hann fer við øllum tingumboðunum.

- Heldur enn at broyta vallógina, haldi eg, at flokkarnir hvør sær, eiga at syrgja fyri at fáa javnstøðu á vallistunum og at føra kvinnurnar fram í politiska arbeiðnum.

Hann heldur eisini, at hetta er nakað, sum teir ymisku flokkarnir hugsa um.

Sjálvur ivist løgmaður ikki í, at hetta er seinasta landsstýrið, sum bara er mannað við monnum, tí tað krevur tíðarandin.




### PARTABRØV HÆKKAÐU

Góðir roknskapir frá bankum, umframt óvæntað stór rentulækking frá amerikanska tjóðbankanum uppá 0,50% í mun til væntað 0,25%, fekk partabrøvini at hækka týsdagin. Vandi var annars fyri, at marknaðirnir kundu taka illa ímóti eini so stórari rentulækking, tí hetta kundi bent á, at tjóðbankin metti íkomnu kreppuna á lánimarknaðinum verri enn higartil. Íleggjarar tóku tó væl ímóti stóru rentulækkingini og evropisk partabrøv liggja ídag 3% hægri enn fyri viku síðan. Hóast tey amerikonsku partabrøvini eisini hækkaðu nógv, so eru tey ikki eins áhugaverd fyri evropiskar íleggjarar, tí lækkingin í dollarakursinum hesi seinastu árini hevur etið ein part av kurshækkingini upp.

### DOLLARIN SØGULIGA LÁGUR

Dollarin sum hevur verði javnt fallandi síðan byrjanini av 2006, var í vikuni niðri á 5,28. Langu lækkingina í dollaranum skyldast í stóran mun vaksandi hallið á amerikansku gjaldsjavnanum. Økti fíggingartørvurin fær dollaran at lækka og tá amerikanski tjóðbankin nú eisini lækkar rentuna, verður steinur lagdur omaná byrðuna. Bretska pundið sum hevur verið niðri á 10,62 og vent í farnu viku er hækkað uppí 10,70. Tó er langt upp til støðið undan stóru lækkingini fyri tveimum vikum síðan, tá kursurin lá um 11,05.

### RENTURNAR HÆKKA AFTUR

Íleggjarar taka aftur størri váða. Hettar hevur vent støðugu rentulækkingini síðan juli mánaða til eina hækking. 10 ára lánsbrævarentan liggur ídag á 4,44% í mun til 4,28% fyri viku síðan.

### BANKAROKNSKAPIR KUNNU ÁVIRKA

Áhugaverd lyklatøl úr USA hesa vikuna eru brúkaraálit , tøl um húsasøluna og prísvøkstur. Meiri sannlíkt er, at roknskaparkunngerðir og viðmerkingar frá fleiri størri bankum fara at ávirka marknaðirnar meira hesa vikuna. Hóast partabrævamarknaðirnir hava sýnt styrki seinastu tvær vikurnar, mælir Kaupthing serliga teimum varligu íleggjarum at bíða við nýggjum íløgum til størri vissa er fingin fyri, at góða rákið síðan 2003 heldur fram.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1464,06 | + 4,06% |
| Alheims partabrøv | 8529,70 | + 2,17% |
| Atlantic Petroleum | 1424,00 | + 5,72% |
| Føroya Banki | 217,00 | -1,81% |
| Eik Banki | 651,00 | -1,66% |
| KB Trygg Eurostoxx | 110,26 | + 1,17% |
| USD | 529,24 | -1,48% |
| JPY | 4,61 | -1,27% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK